## DAGSINS MEINING

# Ábót til pensjónistar - eftir »síðsta útkall«

Føroysku fólkapensjónistarnir fáa nú 400 krónur meiri um mánaðin. Harafturat kunnu fólkapensjónistar vinna meiri pening, áðrenn viðbótin hjá fólapensjónistunum fer at lækka í stigum. Allur bati bøtir, og sjálvandi fegnast øll um, at fólkapensjónistarnir fáa betri fíggjarlig kor.

Men aftur hesa ferð fáa teir pensjónistar, sum bara fáa fólkapensjón, minst burtur úr hækkingini. Tað er í fínasta lagi og rætt, at pensjónistar skulu hava meiri eftir, tá teir arbeiða. Einki er so súrt sum at arbeiða, og síggja, at pensjónsviðbótin minkar og alt fer í skatti.

Hetta uppskotið er tí eisini kærkomið, men tá tað er sagt, at skulu vit eisini minnast til, at teir flestu pensjónistarnir arbeiða ikki. Summir orka ikki, aðrir eru kanska ov gamlir og í summum førum er kanska einki arbeiði í bygdini ella býnum, har pensjónisturin býr. Men nakrir fáa so gagn burtur úr hesum partinum í uppskoti landsstýrisins.

Skulu allir pensjónistar - og serliga teir, sum bara hava fólkapensjónina at líta á - fáa meiri, so skal annaðhvørt grundupphæddin ella viðbótin fáa nakrar hundrað krónur omaná. Hetta hevði gagnað øllum pensjónistum.

Harafturat eigur Javnaðarflokkurin at taka uppskotið um at prístalsviðgera fólkapesnjónirnar framaftur. Hetta uppskotið feldi landsstýrissamgongan í síðsta mánað. Tá heldi hon eisini uppskotini hjá Javnaðarflokkinum og Helenu Dam á Neystabø í samband við fíggjarlógarviðgerðina at hækka fólkapensjónina tilsamans slakar 30 mió.kr.

Tá kom eingin ábending um, at ætlanin var at bøta støðuna hjá fólkapensjónistunum. Einki er sett av á fíggjarlógini, og kommunurnar fingu eingi boð um, at tær skuldu seta pening av, tí ætlanin var at hækka ella broyta pensjónirnar. Hetta kann koma tvørt fyri hjá fleiri kommunum. Mannagongdin líkist svarta ongum og vísir, at landsstýrið virðir ikki kommunurnar nóg nógv.

Tað er lítið at ivast í, at uppskotini hjá Javnaðarflokkinum og Helenu at hækka pensjónina, og tað at val stendur fyri framman, hava tvingað landsstýrið at koma við eini ábót til fólkapensjónirnar. Eftir veljarakanningunum standa Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin illa í tí. Og tí hava flokkarnir óivað ásannað, at neyðugt var at koma við uppskoti um ábøtur eftir "síðsta útkall", sum var tá fíggjarlógin var fyri í desember mánað. Men var uppskotið við tá, hevði lógin víst eitt størri hall og tað hevði heldur ikki gagnað landsstýrissamgonguni.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Kommunurnar gjalda

**Finnleif Guttesen**
*borgarstjóri*



**Stórtíðindi frá samgonguni 8. janur 2002**

**Neyðhjálp**
Eftir at hava arbeitt intenst síðani fólkatingsvalið, tá samgongan sá, hvar leiðin gekk, koma teir nú, 4 mánaðir áðrenn løgtingsvalið, við neyðhjálp, sum skal sissa pensiónistarnar.

**Hildnir fyri gjøldur**
Allur bati bøtir, og skal tað verða pensiónistinum væl unt, at teir fáa umleið 400 kr. meira um mánaðin, men álvaratos, er hatta ikki at halda teir fyri gjøldur? Hvørjir pensiónistar, sum ikki kunnu arbeiða, tí teir eru sjúkir, avlamnir og annars illa fyri, fáa gleði av, at inntøkan við síðuna av pensjón og viðbót hækkar úr 22.300 krónum um árið upp í 44.500 krónur, ikki ein.

**Kommunurnar og eisini pensiónistarnir gjalda**
Tað er enn einaferð tær kommunur, sum eru ringast fyri og tí hava høgt skattaprosent, sum koma at gjalda, og má ein undrast yvir, at samgongan brúkar sama "harraboðs framferð" yvir fyri kommununum, sum tá í botnfrádrátturin bleiv hækkaðaur.

Eftir at hesar kommunur hava gjørt og viðtikið sínar fíggjarætlanir, viðtekur samgongan lógir, sum ávirkar inntøkurnar mundandi hjá kommununum tann skeiva vegin, soleiðis at ætlanirnar mugu broytast til stóran ampa fyri borgarnar í kommununi, eisini pensiónistarnar.

Ein má undrast yvir, at samgongutinglimir, sum vara av kommununum, taka undir við hesari framferð.

**"Neyðtøka"**
Allur skattalætti, sum hendan samgongan reypar um, hava kommunurnar goldið sín stóra part av. Tað kann samanlíknast við "neyðtøku", tí kommurnar eru ikki eftirspurdar og hava heldur ikki haft møguleika fyri at siga nei, tí samgongan hevur bert tikið.

Sami framgangsmáti er brúktur viðvíkjandi kirkjuskattunum, har landið og ikki kommunurnar áseta prosentið nú, hetta hevur við sær at prosentið er hækkað frá 0,25 til 0,30 og síðani til 0,70.

Framgangsmátin bleiv eisini brúktur, tá ið FAS-skipanin kom í gildi og kostar hetta kommununum 12 mill krónur.

**Niðurbindir kommunur**
Tað er luturin hjá teimun, sum stýra, at vera umhugsin og vísa fyrilit, men tað kann ikki sigast um verandi samgongu, sum við sínum framferðarhátti niðurbindur tær kommunur enn meira, sum eru ringast fyri.

Tá ið spurt var í Fíggjarmálastýrinum um hædd var tikin fyri mistar inntøkur hjá kommununum var svarið, at tað var ikki endaliga politiskt viðgjørt.

# Høvdið á blokkin

**Heðin Mortensen**
*løgtingsmaður*



Løgmaður og varaløgmaður eru ikki so væl longur. Men eitt eru teir samdir um. Teir vilja leggja høvdið á blokkin. Títt høvd! Hóast vit ikki gerast petti meiri sjálvbjargin ella sjálvstøðug, so hava teir lækka blokkin uttan at spyrja føroyingar eftir.

**Hvønn rætt eiga føroyingar til blokkin?**
Tá ið vit nú – av meiri og minni góðum huga – hava góðtikið at vera í einum samveldi, er tað við ávísum treytum og ávísum rættindum.

Millum treytirnar er, at vit skulu góðtaka verjupolitikkin hjá ríkinum, og at tað er ríkið, sum eigur fullveldi. Tað merkir, at ríkið umboðar okkum í ST og ríkið tekur støðu í verjumálum.

Millum rættindini er, at tað verður javnað út millum ríkispartarnar.

Fyri hálvt hundrað árum síðani vóru varðagøtur og mjólkabátar samferðslukervi. Tá arbeiddu tey flestu til tey doyðu ella vóru forsyrgd inni hjá skyldfólki. Í dag hava vit bussar og undirsjóvartunnlar, ellisheim og fólkapensjón.

Partvís er hetta takka verið, at vit hava havt eina útjavnan ímillum ríkispartarnar. Partvís eisini hinar fyrimunirnar av ríkinum, gjaldoyra, útbúgvingar, osfr.

Hvør hevur havt største fyrimunin? Eg veit ikki – hvør hevur størri fyrimun, tann eldri, sum fær pensjónina, ella tann yngri, sum letur hana? – Báðir partar!

Blokkurin er ein rættur, sum vit eiga so leingi vit brúka okkara sjálvsavgerðarætt at vera í ríkinum. Sjálvandi er støddin ein samráðingarspurningur, men Høgni og Anfinn skulu halda fingrar – og okkara høvd – frá blokkinum, um teir ikki tora at melda seg úr ríkinum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Dan, Signar, Jógvan, Tobbi, Jóhan Heri, Kári …

**Rætta tulkingin av mínum egna lesarabrævi tann 21. des.**

**Bill Justinussen**



Ikki smávegis sum fingið er burturúr teimum fáu reglunum, eg í skundi festi á blað hendan dagin stutt fyri jól, meðan eg hoyrdi orðaskiftið á tingi. Ikki metti eg orðini so tungtvigandi, at tey skuldu lokka fleiri lokalpolitiskar varðmenn fram á barrikadurnar. Ótespilig, vamlislig og smakkleys eru bert nøkur av lýsingarorðunum, sum eru varpað út gjøgnum tíðindamiðlarnar hesar jóladagarnar. Onkursvegna man eg vera komin onkrum ov nær, nú dagarnir í hesum valskeiðnum fara at líða. Eg skal tí gera eina roynd at tulka míni egnu orð, so møgulig ivamál kunnu rættast.

**Yvirskriftin "tríggir lærarar úr Fuglafirði"**
So løgið, tað ljóðar, hevur sjálv greinayvirskriftin gjørt sítt til hørðu ábreiðslurnar. Vanliga hugsanin er, at eg við hesi yvirskrift so ella so niðurgeri lærarayrkið, og hevur soleiðis eisini onkur av greinskrivarunum fylgt hesum tónanum. Men lat ongan iva vera um, at hetta als ikki var ætlanin við yvirskriftini. Eg havi onga orsøk og ei heldur nakað ynski ella nakran rætt til slíkan hugburð. Satt at siga sæt eg og hugleiddi um, hvussu ein fangandi yvirskrift skuldi síggja út, tí ikki er óvanligt at uppliva, at fá hava lisið tað, sum ein hevur fest á blað. Hetta er helst nakað, sum allir lesarabrævskrivarar hugleiða um; hugsið bert um yvirskriftirnar "Overkill á Bill" og "Øvundarmaðurin". Hesir hava uttan iva brúkt eina løtu at finna fram til hesar hugfarsligu yvirskriftirnar, ella kanska eru tær komnar sum bráðligar opinberingar? Soleiðis var eisini hjá mær, og var hetta tankin. Sjálvandi sprottin úr tí sjáldsama eindømi, at ein bygd við 1500 fólkum hevur heili trý løgtingsumboð og harafturat hava øll trý umboðini sama yrki. Slíkt fyribrygdi hendir neyvan nakrantíð aftur. Lat meg sláa rimmarfast, at eg havi stóra virðing fyri lærarayrkinum, tí eg veit, hvønn týdning tað hevur, at børn okkara fáa góða og holla undirvísing sum týðandi førning restina alt lívið.

Samstundis var tankin eisini, at Løgtingið eigur at vera so ymisligt og fjøltáttað samansett, sum yvirhøvur tilber fyri at øll mál kunnu fáa eina so breiða og harvið góða viðgerð sum gjørligt. Har eiga at vera ung og gomul, kvinnur og menn, skiparar og dekkarar, lærarar og næmingar, leik og lærd, úr bygd og bý o.s.fr. Tá so tríggir løgtingsmenn koma úr eini og somu bygd og harumframt úr sama arbeiðsumhvørvi, er vandi fyri, at sjónarhornini gerast ov fá. Hetta er sjálvsagt als ikki tykkara skyld, men ein sjáldsom tilvild.

**Bjálkin**
Bjálkin í greinini var at fáa fólk kring Skálafjørðin og serliga í Runavíkar kommunu at hugsa nærri um tingmannabýtið í Eysturoynni, tá teirra demokratiski rættur um stutta tíð aftur skal staðfestast. Støðan í okkara kommunu er soleiðis háttað, at fólk sum heild velja hugsjónarliga við minni atliti til heimstað teirra, sum bjóða seg fram. Hetta eru stórar dygdir og stórliga í trá við fólkaræðisligu skipanina. Men avleiðingin kann gerast, at hetta størsta økið í Eysturoynni ongan umdømisvaldan tingmann fær. Hendan bjálkan tyktist ongin av fuglfjarðatingmonnunum at hava fingið eyga á, meðan teir hava funnið hópin av flísum, sum teir hava lagt undir sjóneyku og støddarøkt fleirfaldað. Ásannast má, at tað, ein skrivar, ikki er tað, annar lesur.

**Flísirnar**
Ein, sum eg ikki kenni og ongantíð mær vitandi havi tosað við, gevur í grein síni eina nærum fullfíggjaða persónsgreining av undirritaða. Myndin, hann málar, er ikki vøkur. Tað má sigast at vera satt avrik at kunna lýsa ein persón so nágreiniliga, sum hesin ger, tá havt verður í huga, at einasta grundarlagið fyri hesi persónsanalysu eru nakrar hissini reglur í einum lesarabrævi. Men ætlanin við greinini var ikki at opinbera mína innaru menniskju, men at gera eina politiska við-merking. Hann nevnir, at eg havi vorharra í skjøldrinum, og tað er rætt. Eg havi hann bæði í skjøldrinum og í hjartadýpinum. Ikki sum eina politiska etikett, men sum lívsgrundarlagið og lívsinnihaldið.

Dan Reinert Petersen ger eisini sama mistak. Hann fer eftir manninum heldur enn bóltinum. Hetta tími eg heldur ikki at viðgera, tí hann hevur eisini valt at lesa tað, sum stendur millum linjurnar, heldur enn at lesa tað, sum stendur á teimum.

**Kristnu lívsvirðini**
At eg dittaði mær at nevna kristnu lívsvirðini í endanum á greinini var kanska nakað knortlut í samlaða høpinum og skal eg viðganga, at tað kann misfatast. Hetta var ikki meint sum ábreiðsla á fuglfjarðatingmenninar, men sum ein generel viðmerking.

Vónandi megna vit framyvir at lyfta politiska kjakið upp á hægri støði fyrst og fremst til gagn fyri land og fólk.

Gott nýggjár, øll somul!

# Bláar hosur

**Leila Hjørleivsdóttir á Lofti**



Ikki man tað vera, at fólkafloksfólk hava latið seg í bláar hosir, enn minni munnu tey flóta omaná ella reka við vindinum, eins og leiðarin í Dimmu vil vera við.

Nýggjársrøða løgmans var góð, hon var positiv og ynski løgmans um tryggleika fyri øll var ikki til at taka feil av.

Fólkaflokkurin skal nokk standa við sítt, tá rætta høvið býðst, verið ikki bangin fyri tí. At fólkaatkvøðan varð avlýst, er bara enn eitt dømi um ábyrgdarkenslu.

Sum eg havi nevnt í øðrum lesarabrøvum, eru 4 ár ongin tíð til so týdningarmikil og avgerandi mál. Vit skulu nokk náa tað. Men sameinast fyrst.

Eg havi fest meg við kommentarir í bløðunum frá andstøðutingmonnum, ið eru illa við av orðum løgmans, at í Føroyum hava vit ikki kriminalitet, ei heldur stættarmun. Tað hevði verið áhugavert at vita, um hesir møguliga kenna nakað samfelag, ríkt ella fátækt, vælferðarsamfelag ella ikki, uttan kriminalitet og stættarmun? Eg spyrji bara.

Hóast ynski um at skipa Føroyar á annan hátt, koma vit menniskju neyvan at skapa Paradísið her á jørð, ei heldur í Føroyum, vit kunnu í naiviteti droyma um tað, longur koma vit ikki.

Tá mín familja í mei`99 ættleiddi okkara næstu dóttir, kom leiðarin á barnaheiminum BalVikas, Bombay, sjálv við henni. Hon ynskti at koma til Føroyar, m.a. fyri at síggja, hvat tað var fyri umstøður, hon lat børn síni fara til.Og hon var sera nøgd, hon vitjaði fleiri av familjunum og hevði bert rós at bera. O.K. Rætt skal vera rætt, eg tordi ikki at siga henni, at okkara børn ikki sluppu inn á stovn beint eftir farloyvi; men tað er ein onnur søga.

Hon vitjaði barnagarð og vøggustovu og var positivt yvirraskað. Síðani spurdu vit hana, um hon hevði hug at vitja okkara barnaheim, tá kvakk hon við og spurdi: »Hava tit eitt barnaheim? Til hvat?«

Eg kom í dýrastu neyð, byrjaði at hugsa, at nú tók hon garanterað okkara dýrabaru døtur við sær aftur til India; men eg skundaði mær at svara, at eitthvørt vælferðarsamfelag eisini hevur trupulleikar at dragast við, sum vit ikki sleppa undan, hóast vit alla tíðina mugu stremba eftir, at halda teimum á einum so minimalum støði sum gjørligt.

Tí aftur til nýggjársrøðuna, hví í allari víðu verð skuldi løgmaður brúkt tíð upp á at staðfesta kriminalitet og stættarmun, halda tit veruliga, at hann ikki veit, at nakrir borgarar eru endaðir í tí vanlagnu, har kriminalitetur verður tikin í brúk sum neyðloysn, ella halda tit, at hann ikki veit, at fleiri stríðast fyri at fáa endarnar at røkka saman?

Víst veit hann tað, men at brúka hetta sum eitt slag av valagn, eins og tað sær út til at áðurnevndu skrivarar gera, tað er langt undir hansara støði.

So stutt kann tað sigast.

Vit fólkafloksfólk eru soleiðis samanskrúvað, at vit eru realistar um ein háls. Líka mikið, hvat fyri samgongu vit seta saman, so trúgvi eg ikki uppá, at tann dagur kemur, har vit øll sita lukkulig við eini ársløn upp á 220.000,00 krónur og ein Hawaii sodavatn í hondini.

Hví? Tí menniskjan ikki er so einføld skrúvað saman.

Annars segði løgmaður orðarætt: »SAMANBORIÐ VIÐ ONNUR LOND, hava vit ikki stættarmun og heldur ikki kriminalitet«. Og hann segði eisini, at EINGIN skal verða settur uttanfyri.Vit skulu støðugt stremba eftir, at tillaga samfelagið soleiðis, at ØLLUM verður unnt eitt virðiligt lív.

Kann tað sigast betur?

Samanumtikið vil eg, sum ein av íbúgvunum í Føroyum, bert siga løgmanni tøkk fyri eina røðu, ið gevur okkum vón, eina vón um, at SAMAN skulu vit nokk náa málinum, tí málinum, ið er og sum ger, at Føroyar skulu vera eitt trygt og gott land fyri okkum øll at búgva í.

Tryggleiki fyri øll, eisini tey, ið eru komin út í kriminalitet. Stættarmunin trúgvi eg tíanverri,at tað verður verri at gera enda á. Væl at merkja,um vit leggja tað sama í orðið stættarmunur.

Gott nýggjár øll somul

P.S. Eg havi ikki tosað við løgmann, tað eg sigi um hann stendur fyri egna rokning.

# Ein barnagarð í part!

**Jógvan Arge**



Mentamálanevndin hjá býráðnum býtti seg í tveir partar í málinum um tveir nýggjar ansingarstovnar.

Samgongulimirnir Heðin Mortensen, Bjarti Mohr og Beate L. Samuelsen mæla til, at Sp/f Høgni Mikkelsen sleppur at byggja stovnin á Argjum og Sp/f Búsetur stovnin í Hoyvík.

Jógvan Arge mælir til, at tikið verður av tilboðnum frá Sp/f Búsetur í báðum førum, bæði á Hamrinum á Argjum og við Løgmannabreyt í Hoyvík.

Metingarbólkurin, sum býráðið setti, mælti mentamálanevndini til at taka av tilboðunum frá Sp/f Búsetur upp á báðar stovnarnar.

Bólkurin segði, at hesi tilboð vóru munandi betri enn nøkur av hinum tilboðunum, og at uppskotini hjá Sp/f Búsetur sum heild vóru besta loysnin fyri kommununa.

"Eg eri skelkaður av støðuni hjá meirilutanum. Her tykjast verða tikin atlit, sum ikki seta brúkararnar fremst", sigur Jógvan Arge.

Tilráðingin hjá mentamálanevndini fer nú til viðgerðar í fíggjarnevndini, sum hevur fund í morgin - hósdagin. Ætlandi kemur málið til endaliga avgerð á stongdum og opnum býráðsfundi í morgin kl. 17.00 og 17.30.